GJALDSTOVAN

# ÚTBOÐ
# SKÚLANET

1. Inngangur ..... 3
Luttøka og gjald ..... 3
Um útbjóðingartilfarið ..... 4
2. Lýsing av veitingini ..... 4
Tekniskar útgreiningar ..... 5
Linjur ..... 5
NAC (Network Access Control, 802.1x) ..... 6
Nýtsla av tráðleysum neti á skúlunum ..... 6
Ástaðarkanning (Site Survey) ..... 6
Generiski skúlin ..... 6
Tekniska samstarvið ..... 6
Sáttmáli ..... 7
3. Útbjóðingartilgongdin og innlating av tilboði ..... 8
Innihald av tilboði ..... 8
Innlating av tilboði ..... 9
4. Tíðarætlan fyri útbjóðing ..... 9
Almannakunngering av útboði ..... 10
Skrivligir spurningar ..... 10
Broytingar uppskot ..... 10
Spurnafundur fyri veitarum ..... 10
Framløgufundir og framløga av tilboði ..... 10
5. Almenn krøv til veitaran ..... 10
Kjølfesti í Føroyum ..... 10
Organisatión og førleikar ..... 11
Fíggjarviðurskifti ..... 11
Skipan av verkætlan ..... 11
6. Vekting ..... 11
Fráboðan um avgerð ..... 12

# 1. Inngangur

Føroya landsstýri hevur avgjørt at seta á stovn eitt skikkað KT samstarv fyri allan undirvísingargeiran í Føroyum grundað á Landsnet. Samstarvið hevur fingið heitið **Skúlanet** og verður ment í mun til hesi mál og visiónir: (les meira í fylgiskjal 7 og fylgiskjal 8)

- Skúlanet skal standa fyri KT trygd, innkeypi, rakstri og brúkarahjálp innan KT til útbúgvingarstovnar í Føroyum.
- Skúlanet skal veita tænastur grundaðar á altjóða viðurkenda tøkni, arbeiðshættir og samstarva við teir dugnaligastu KT veitararnar í Føroyum og útlandinum.
- Skúlanet skal stuðla upp undir betri KT trygd, skynsomum KT íløgum og munadyggum KT rakstri í undirvísingargeiranum yvirhøvur og á teimum einstøku skúlunum.
- Skúlanet skal seta á stovn og hjálpa fakligum samstørvum viðvíkjandi KT trygd, innkeypi, rakstri, brúkarahjálp og førleikamenning.

Fleiri fyrimunir eru við Skúlaneti. Skúlanet skal nøkta øktu krøvini til undirvísingargeiran viðvíkjandi KT trygd, sum vernd móti alsamt vaksandi og fjøltáttaðum hóttanum á KT økinum. Harumframt skal Skúlanet vera við í arbeiðinum at hjálpa skúlunum at lúka núverandi og framtíðar krøv viðvíkjandi KT trygd og viðgerð av persónsdátum í føroyskum høpi.

Skúlanet merkir eisini ein tøkniligan og fíggjarligan munadyggan samrakstur og smidleika í dagliga arbeiðinum við KT og brúkarahjálp. Fleiri rakstrar- og hjálparuppgávur skulu savnast saman og standardiserast fyri at stuðla upp undir bæði bíligari og betri brúkarahjálp.

Skúlanet skal eisini vera ein liður á eini felags leið og ætlan fyri undirstøðukervið fyri allan undirvísingargeiran. Við eini ætlan ber til at samskipa og raðfesta íløgur í undirstøðukervið fyri bæði smærri og størri eindir sum tørvurin verður. Á henda hátt fáa næmingar, lærarar og onnur starvsfólk, sama prís fyri somu veiting, uttan mun til hvønn útbúgvingarstovn ella hvørjari kommunu tey eru knýtt at.

Skúlanet fevnir um ymisk sløg av tøkni. Í fyrstu atløgu er talan um eitt væl skipað og trygt undirstøðukervi, ið er grundað á eitt tekniskt net, atgongd til internetið og arbeiðsteldur, har undirstøðukervið verður ment og røkt av Gjaldstovan, KT Landsins.

Gjaldstovan, KT Landsins skal m.a. veita hesar tænastur til skúlarnar:

- Umsiting og rakstur av net-undirstøðukervi so sum access points, switches og firewalls
- KT brúkarahjálp til starvsfólk og næmingar
- Innkeyp, gera klárar teldur og viðlíkahald av teldum til starvsfólk og næmingar
- Ráðgeving og samráðingar um KT innkeyp, lisensir og rakstaravtalur
- KT trygdarráðgeving og yvirvaking av skipanum

## Luttøka og gjald

Gjaldstovan, KT Landsins veitir Skúlanet, og er Skúlanet samskipað við Landsneti.

Skúlarnir rinda mánaðarliga fyri tænasturnar, sum eru veittar undir Skúlaneti. Allar tænasturnar eru "as a service", tað vil siga, at sløkkir ein skúli fyri einum brúkara, lækkar gjaldið samsvarandi.

Henda skipanin ger, at skúlarnir mánað fyri mánað rinda eitt javnt gjald fyri brúka net-undirstøðukervið.

Fyri at loysnin búskaparliga skal hanga saman, verður gjaldið undir "hesi avtaluni" eisini as a service (stytt AAS), soleiðis at tað gjaldið, sum skúlarnir rinda til Gjaldstovuna, KT Landsins avspeglar tað gjaldið, sum Gjaldstovan, KT Landsins kemur at rinda undir "hesi avtaluni".

### Um útbjóðingartilfarið

Útbjóðingartilfarið er gjørt av einum arbeiðsbólki skipaður undir Gjaldstovuni, KT Landsins. Arbeiðsbólkurin hevur verið mannaður av hesum serfrøðingunum:

Birgir av Steinum, deildarleiðara, KT Landsins, Bjarni Fríðberg, Rakstur/2nd level support, KT Landsins, Frankie Jensen, Virkisrøktara, KT Landsins, Mikkel Hansen, tekniskum stjóra, Elektron, Steffen Löfvall, stjóri, Copenhagen Learning.

Uppskot til útbjóðingartilfarið hevur verið til hoyringar hjá umboðum fyri KT vinnuna og síðan gjøgnumarbeitt saman við Hera Joensen, tøkniligum ráðgeva.

Gjaldstovan, KT Landsins tilskilar sær rætt í hesum útboðunum at samráðast við ein ella fleiri veitarar, ið hava tey hava tey bestu ella mest fíggjarligu lønandi tilboðini, grundað á tær vigaðu (vektaðu) og raðfestu treytirnar í útboðnum. Tá samráðingarnar byrja, verður upplýst, hvørjar mannagongdir verða fylgdar í sáttmálasamráðingunum. Undir samráðingunum royna vit at tryggja, at tilboðsgevarar verða viðgjørdir eins.

Gjaldstovan, KT Landsins skal boða tilboðsgevarunum frá so skjótt til ber, um teir eru við í sáttmálasamráðingum ella ikki og um orsøkirnar til tess.

Gjaldstovan, KT Landsins tilskilar sær rættin til at síggja burtur frá innsendum tilboðum. Eftir umsókn frá viðkomandi tilboðsgevarum skal Gjaldstovan, KT Landsins grundgeva fyri, hví tilboðið er vrakað.

## 2. Lýsing av veitingini

KT undirstøðukervi er ein av høvuðslutunum í Skúlaneti og vigar tí munandi í fíggjarliga partinum av samlaðu loysnini.

Útboðið fevnir um keyp av útgerð og rakstur av undirstøðukervinum av Skúlanet.

Tekniska installatiónin av útbúnaði og viðlíkahald skal vera veitt av einum og sama KT veitara, so møgulig ivamál um ábyrgd í mun til viðlíkahald, brúkarahjálp og tekniskar trupulleikar verða so fá sum gjørligt.

Ynski er, at talan verður um eina samlaða loysn av tekniska undirstøðukervinum, ið so vítt gjørligt er grundað á eitt altjóða viðurkent vørumerki, her skilt sum Enterprise Grade útbúnað. Við einum einsháttaðum tekniskum palli, er tað møguligt at yvirvakja netið á ein munadyggan hátt.

Útbúnaðurin, ið verður boðin út, skal lúka standard krøv innan viðkomandi vinnugreinar (branchu specifik) og vera bygdur á viðurkendar standardar 'best practice', ið skal vera ein trygd fyri høga góðsku.

Tikið verður av tilboðnum, ið lønar seg best fíggjarliga og best lýkur krøvini, ið eru lýst í útboðnum.

## Tekniskar útgreiningar

Skúlanet-undirstøðukervið skal grundast á tøkni frá einum av teimum stóru og kendu veitarum, har yvirvaking og uppseting av allari útgerð verður savnað í eini skipan. Fyri at tryggja, at brúkararnir fáa skjóta atgongd til skipanir á internetinum, og at teir samstundis hava atgongd til miðsavnaðu loysnirnar, ið verða hýstar í skúlaneti, verður sambandið bygt á Software-defined Wide Area Network (SD-WAN) tøkni.

Tey teknisku og funktionellu krøvini til Skúlanet eru útgreinað í fylgiskjali 1.

Í tilboðnum skal veitarin leggja upp fyri, at ongin nágreinilig ætlan er løgd fyri, nær ymsu skúlarnir verða innlimaðir í Skúlaneti. Orsøkin til tess er, at tingini byggja á eitt ávíst frívilliheitsprincipp. So neyðugt er, at undirstøðukervið í tilboðnum kann verða bygt út, so hvørt fleiri undirvísingar-stovnar verða innlimaðir.

Fylgiskjal 2 vísir eitt yvirlit yvir, hvar skúlarnir, ið við tíðini eftir ætlan verða innlimaðir í Skúlanet, eru staðsettir, og hvørja støðd teir hava. Støddin er lýst við tali av næmingum og ársverkum. Sostatt kunnu veitararnir fáa eina mynd av, hvussu stórt vavið av loysnini er, tá allir skúlar eru innlimaðir í Skúlanet. Tó skal havast í huga, at tað í framtíðini kunnu verða aðrir undirvísingarstovnar, ið verða partur av skúlanetinum.

Teknisku upplýsingarnar frá framleiðarunum viðvíkjandi útbúnaðinum í tilboðnum, t.e. bæði hardware og software, eiga at verða lagdar við tilboðnum, um hesar upplýsingarnar eru tøkar.

## Linjur

Linjur í sambandi við Skúlanet eru ikki ein partur av hesum útboði.

## NAC (Network Access Control, 802.1x)

Loysnin í tilboðnum skal styðja uppundir NAC (Network Access Control, 802.1x) fyri allar eindir, soleiðis at NAC stýrir øllum eindum, ið verða bundnar til netið á skúlunum, bæði tá talan er um tráðleys net ella kaðalnet.




Mynd 2 - Dømi um, hvar NAC virkar á netinum

## Nýtsla av tráðleysum neti á skúlunum

Næmingar fara í nógv størsta mun at brúka tráðleysa netið, tí er eitt gott og støðugt net av allarstørsta týdningi fyri stóran part av undirvísingina á skúlunum.

## Ástaðarkanning (Site Survey)

Áðrenn ein undivísingarstovnur verður bundin í Skúlanet-undirstøðukervið er neyðugt, at veitarin ger eina ástaðarkanning av øki og bygningum, fyri at eitt væleydnað skifti frá verandi neti til Skúlanet kann fara fram.

## Generiski skúlin

Fyri at gera tilboðini meira samanbarlig, og fyri at tryggja, at tilboðsgevari hevur røttu fatanina av uppgávuni, er ynski, at tilboðið bæði tekniskt og fíggjarliga eisini er útgreinað grundað á ein generiskan skúla umframt sjálva loysnina til alt Skúlanetið.

Lýsingin av tí generiska skúlanum er grundað á eina greining av KT støðuni hjá øllum føroysku skúlum. (sí fylgiskjal 3)

## Tekniska samstarvið

Tilboðið eigur at leggja upp fyri arbeiðsbýti millum fleiri partar, tá ið umræður fysiska uppseting og rakstur av tekniska undirstøðukervinum.

(1) Í mun til uppseting av tekniska útbúnaðinum á skúlunum, skal tilboðið leggja upp fyri:

- Uppseting at tekniskum útbúnað: Ástaðskanningar (Site Survey) og tann fysiska uppsetingin av útbúnaði verður gjørd av KT veitaranum.

- Uppseting av netkaðlum verður gjørd av elektrikara, ið KTL og/ella skúlin hevur sett seg í samband við í samráð við KT veitaran. (Kostnaðurin av hesum partinum, heldur skúlin, við øðrum orðum skal ikki við í tilboðið)
- Útskifting av tekniskum útbúnaði: Afturvendandi útskiftingar av komponentum, ið av ymiskum orsøkum ikki virka, verða gjørdar av KTL ella KT vørði á viðkomandi skúla.

Meginreglan er, at tá ein skúli verður partur av Skúlaneti, verður verandi tekniska undirstøðukervi skift út við nýggja felags undirstøðukervið hjá Skúlaneti. Um tað er skilagott, kann útskiftingin av nýggjari installatiónum (undirstøðukervi) á einum skúla, og sum hava eitt høgt góðskustig, bíða eina tíð t.d. 2 ár.

(2) Viðvíkjandi brúkarahjálpini og yvirvakingini av útbúnaðinum í tekniska undirstøðukervinum, skal tilboðið taka hædd fyri:

- 1. level support: Brúkarahjálpin frá KTL og frá KT vørðum á skúlunum skulu hava atgongd til beinleiðis netupplýsingar umvegis dashboard forrit fyri at kunna hjálpa og ráðgeva skúlunum.
- 2. level support: Brúkarahjálpin á KTL skal kunna yvirvakja og broyta stillingarnar á netinum umvegis dashboard forrit.
- 3. level support: KT veitarin, og í øðrum lagi aðrir samstarvandi undirveitarar skulu altíð kunna yvirvakja og broyta stillingarnar á netinum umvegis dashboard forrit.
- 3. level support: KTL skal altíð kunna greina kapasitetin og trýstið á netinum, og skal eisini kunna gera nærri kanningar i trygdararbeiðinum grundað á kunning frá dashboard. Út frá einum læringar- og ráðgevingarsjónarmiði skal veitarin verða tøkur at hjálpa við at greina og hjálpa at skilja skipanina.

## Sáttmáli

Tá greitt er, hvør veitari hevur besta tilboðið, byrja samráðingarar um sáttmála.

Vit hugsa, at sáttmálin er galdandi í 5 ár.

Eitt boð fyri tørvin á access points og switches er víst í talvuni niðanfyri . Vit hava sett talvuna upp eftir einum besta boði uppá, hvussu verkætlanin kann koma at síggja út.

Talan er um fleiri ivamál í verkætlanini í mun til nær skúlarnir luttaka, hvørjir skúlar luttaka og tørvin á tøkniligari útgerð. Tí skal tilboðið verða grundað á trý hugsandi senariu, ið eru víst í talvuni.

Fyri at minka um óvissurnar og at fyri skapa eina realismu í útboðnum, bindur Gjaldstovan, KT Landsins seg at keypa í minsta lagi:

- 1000 Access Points
- 200 Switches
- 30 Firewalls

fyri 31. desember 2026. (íroknað lisensir)

Gjaldstovan ynskir, at veitingin er AAS yvir 5 ár. Tað vil siga, at vit ynskja eitt fast mánaðargjald gjald alt íroknað yvir 5 ár fyri hvørja eind. Herundir alt í nevnt í fylgiskjal 5, og uppseting av dashboards, zero-config, yvirvaking, core við uppseting, hardware og lisens, teknisk uppseting av firewalls og rætt til nýggja tøkni[1].

Heldur Gjaldstovan, KT Landsins at AAS er ov dýrt í mun til at keypa veitingina kontant (í einum), tilskila vit okkum rætt til at taka av keypi.

**Talva: Yvirlit yvir, hvussu Gjaldstovan, KT landsins metir, at veitingin av access points og swithes verður liðað á ársfjórðingar næstu árini. Yvirlitið er sett upp við einum neiligum, sannlíkum og jaligum sjónarhorni**

| Access points | | qtr4 '21 | qtr1 '22 | qtr2 '22 | qtr3 '22 | qtr4 '22 | qtr1 '23 | qtr2 '23 | qtr3 '23 | qtr4 '23 | Tilsamans |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | Neiligt | 0 | 80 | 300 | 200 | 100 | 90 | 80 | 80 | 70 | 1000 |
| | Sannlíkt | 100 | 90 | 350 | 200 | 140 | 130 | 130 | 100 | 60 | 1300 |
| | Jaligt | 150 | 150 | 400 | 350 | 200 | 200 | 200 | 180 | 170 | 2000 |
| | | | | | | | | | | | |
| | | | | | | | | | | | |
| Switches | | | | | | | | | | | |
| | Neiligt | 6 | 10 | 44 | 40 | 20 | 20 | 20 | 20 | 20 | 200 |
| | Sannlíkt | 10 | 20 | 60 | 50 | 30 | 30 | 30 | 30 | 40 | 300 |
| | Jaligt | 20 | 30 | 80 | 60 | 50 | 50 | 50 | 30 | 30 | 400 |

Gevið gætur:

- Gjaldstovan, KT Landsins roknar við, at príslækkinar av HW yvir tíð, eru roknaðar inn í tilboðið

## 3. Útbjóðingartilgongdin og innlating av tilboði

Fyri á bestan hátt at geva øllum tilboðsgevarum møguleikan at lýsa teirra veiting undir somu treytum, so veitingin verður mett javnbjóðis við aðrar møguligar veitarar, verður fylgjandi tilgongd nýtt í útbjóðingartilgondini.

### Innihald av tilboði

Tá tilboð verða latin inn, skulu tey innihalda:

- Sjálvt tilboðið við eini frágreiðing og eini tekniskari lýsing av skúlanetinum.
- Fylgiskjal 1, ið greiðir frá, hvussu krøvini verða uppfylt.
- Fylgiskjal 3, eina tøkniliga og fíggjarliga greining grundaða á generiska skúlan.

[1] *Verða tað munandi tøkniligar broytingar á økinum í innlimingarskeiðinum, skal tað vera gjørligt hjá nýggjum skúlum at velja nýggjari modell enn tey, sum verða greinað í tilboðnum/avtaluni.*

- Fylgiskjal 5. Uppskot til eina rakstraravtalu, ið tekur støði teimum yvirskriftum, veitingum og tænastustigi, ið er lýst fylgiskjali 5. Ynskiligt er endaliga avtalan er bygd á t.d. K04 ella D17.
- Fylgiskjal 6, sum skal innihalda allar prísir.
- Roknskapartøl fyri seinastu 3 árini
- Data sheets til útgerðina

### Innlating av tilboði

Tilboðið skal latast Gjaldstovuni, KT Landsins í seinasta lagi **mikudagin 15. september 2021 kl. 12:00**. Tilboðið skal sendast til ktskivan@gjaldstovan.fo.

Bert tilboð, ið er verða latin inn til ásettu tíðarfreistina, verða viðgjørd.

## 4. Tíðarætlan fyri útbjóðing

Niðanfyri sæst tíðarætlanin og lýsingin av tilgongdini.

| | | | |
|---|---|---|---|
| **Mikudagin** | 21-07-2021 | | Útboðið almannakunngjørt á keypsportal.fo. |
| **Mikudagin** | 18-08-2021 | 12:00 | Freist fyri skrivligum spurningum og uppskot til broytingar. |
| **Mikudagin** | 25-08-2021 | 12:00 | Skrivligir spurningar vera svaraðir. |
| **Fríggjadagin** | 27-08-2021 | 13:00 | Fráboðan um luttøku á spurnaðarfundi. |
| **Mikudagin** | 01-09-2021 | 13:00 | Gjøgnumgongd av útboði og spurnarfundur fyri veitarum |
| **Mikudagin** | **15-09-2021** | **12:00** | **Tilboð latast inn** |
| **Mikudagin** | 22-09-2021 | | Framløgufundur við veitarar um innkomin tilboð. |
| **Hósdagur** | 23-09-2021 | | Framløgufundur við veitarar um innkomin tilboð. |
| **Mánadagin** | 27-09-2021 | 09:00 | Sáttmála samráðingar |
| **Mikudagin** | 29-09-2021 | 12:00 | Avtala verður undirskrivað, og tað verður almannakunngjørt. |

### Almannakunngering av útboði
Útboðið verður almannakunngjørt á almenna keypsportalinum  sí undir tíðarætlanini.

### Skrivligir spurningar
Til ber eisini at seta skrivligar spurningar um útboðið til ktskivan@gjaldstovan.fo.

Innkomnir spurningar verða svaraðir  sí undir tíðarætlan. Spurningarnir verða anonymiseraðir.

### Broytingar uppskot
Um veitarar meta, at partar av loysnini áttu at verið øðrvísi, t.d. um okkurt krav er óneyðga dýrt, ella um okkurt kundi verið meir skynsamt loyst, so rokna vit við, at tílík uppskot verða send okkum á ktskivan@gjaldstovan.fo skjótast til ber, og í seinsta lagið dagin sum freistin er fyri skrivligum fyrispurningum,  soleiðis at Gjaldstovan, KT Landsins hevur møguleika at  taka støðu til hetta og møguliga tillaga útboðið.

### Gjøgnumgongd av útboði og spurnafundur fyri veitarum
**Mikudagin 1. september 2021** verður spurnafundur fyri allar áhugaðar veitarar. Fundurin verður hildin á Gjaldstovuni, KT Landsins. Veitarar, ið ynskja at luttaka á spurnafundinum, verða bidnir um at boða frá luttøku við at senda teldupost til ktskivan@gjaldstovan.fo seinasta lagi 5 dagar undan fundinum.

### Framløgufundir og framløga av tilboði
**Mikudagin 22. og hósdagin 23. september 2021** verður skipað fyri framløgufundum fyri hvønn veitara sær við Undirvísingarstýrið og Gjaldstovuna, KT Landsins. Á fundinum fær veitarin møguleika at leggja sína loysn og tilboð fram, so bæði veitari og kundi hava somu fatan av, hvat loysnin og tilboðið fevnir um.

Áðrenn framløgufundin kann Gjaldstovan, KT Landsins senda tilboðsgevaranum ynski um útgreiningar ella nærri lýsingar av tilboði ella loysnini.

Tríggir tímar eru settir av til hvønn framløgufund fyri hvønn veitara.

## 5. Almenn krøv til veitaran
Umframt ítøkiligu krøvini til loysnina, skal veitarin eisini lúka nøkur yvirskipað krøv, sum bæði tryggja, at rammurnar fyri verkætlanina eru so góðar sum til ber og, at veitingin er haldbar fyri allar partar.

### Kjølfesti í Føroyum
Tað er eitt krav, at veitarin av loysnini er ein føroysk skrásett fyritøka, ið hevur tilknýti til Føroyar og í størsta mun:

• rekur sítt virksemi í Føroyum.

• hevur starvsfólk, sum arbeiða í Føroyum.

• tosar føroyskt sum høvuðsmál í samskiftinum við KT Landsins.

Tað er einki sum forðar fyri, at veitarin kann knýta aðrar veitarar og samstarvsfelagar, ið ikki eru staðsettir í Føroyum, at loysa serligar partar av veitingini, men avgerandi er, at vitan og førleikar hjá útlendskum veitarum ella samstarvsfeløgum verða kjølfestir í Føroyum.

Veitarin skal vátta, at felagið lýkur krøvini um kjølfesti í Føroyum.

### Organisatión og førleikar

Veitarin skal lýsa, hvørji starvsfólk ella deild/-ir, skulu verkseta skipanina, umframt hvørji starvsfólk ella deild/-ir skulu reka, veita ráðgeving, víðarimenna og veita brúkarahjálp.

Veitarin skal prógva, at hesi fólk hava førleikarnar at seta skipanina í verk og tryggja ein framhaldandi rakstur í øllum avtaluskeiðnum.

### Fíggjarviðurskifti

Ein fyritreyt fyri, at veitarin kann bjóða veitingina sum AAS, er, at veitarin hevur eina nøktandi fíggjarliga styrki.

Er veitingin munandi í mun til gjaldførisstøðuna og eginpeningin í felagnum, kann Gjaldstovan, KT Landsins krevja, at veitarin búskaparliga tryggjar veitingina í skeiðinum. Eru hesi viðurskifti ikki nøktandi, kann Gjaldstovan, KT Landsins síggja burtur frá tilboðnum.

Veitarin skal vísa á roknskapartøl fyri seinastu 3 árini. Veitarin skal veita meirupplýsingar, um Gjaldstovan, KT Landsins heldur hetta er neyðugt.

Veitarin skal eftir umbøn senda eina váttan fyri, at fyritøkan ikki hevur nakað fíggjarligt útistandandi við  Taks.

### Skipan av verkætlan

Veitarin skal gera eina lýsing av, hvussu øll verkætlanin verður skipað, frá tí at sjálv verkætlanin fer í gongd, til loysnin verður endaliga sett í verk og latin Gjaldstovuni, KT Landsins.

## 6. Vekting

Tey innkomnu tilboðini verða vigað sambært niðanfyristandandi talvu.

| | | |
|---|---|---|
| 1. | Prísur (sí fylgiskjal 6) | 50% |
| *2.* | Tøknilig loysn<br>*(kvalitetur, dashboard, generiski skúlin osfr.)* | 30% |
| *3.* | Samstarv og tænastur<br>*(SLA, Førleikar osv.)*<br>Prísur fyri samlaðu veitingina | 20% |

Ad. 2 Tøknilig loysn

(Góðska, ynski, tann generiski skúlin , o.s.fr.)

Verður vigað út frá góðsku av samlaðu útgerðini.

Kemur veitari við partsveitingum, sum eru meira enn minstukrøvini, verður givið prosentstig fyri hetta.

Tey krøv, sum standa sum ynski í kravlistanum, verða eisini tald við í metingina.

Tað verður eisini mett, hvussu tilboðsgevarin kann loysa uppgávuna í mun til tann generiska skúlan.

Ad. 3 Samstarv og tænastur
(Royndir og førleikar, SLA)
Tað verður talt vi, um tilboðsgevarin hevur royndir og møguligar váttanir (certificeringar) innan tøknina í tilboðnum, umframt tilvísingar, har útbjóðarin hevur staðið fyri líknandi loysnum aðrastaðni.

## Fráboðan um avgerð

Í seinasta lagi mikudagin 29. september 2021 kl. 12:00 verða allir tilboðsgevarar kunnaðir um, hvat tilboð Gjaldstovan, KT Landsins hevur valt.

Teir veitarar, ið ikki vinna útboðið, kunnu biðja um eina frágreiðing um støðutakanina av teirra tilboði.

Um innkomnu tilboðini ikki eru nøktandi í mun til ásettu krøvini, ella kostnaðurin víkir munandi frá teimum kostnaðarmetingum, sum Gjaldstovan, KT Landsins hevur gjørt, tilskilar Gjaldstovan, KT Landsins sær rætt til at taka upp samráðingar við ein ella fleiri tilboðsgevarar. Gjaldstovan, KT Landsins tilskilar sær eisini rætt til ikki taka av nøkrum av innkomnu tilboðunum, um loysnirnar ikki liva upp tøkniliga stigið, sum verður sett í hesum tilfarinum og um prísirnir víkja nógv frá teimum metingum, sum Gjaldstova, KT Landsins hevur gjørt sum forarbeiði til hetta útboðið.